

## Rooney er klárur

Wayne Rooney bleiv skiftur út í dystinum ímóti Liverpool leygardagin við einum skaða í beininum. Tí var ivamál um, hvørt Rooney bleiv klárur til týdningarmikla Champions League-dystin ímóti Lille. Nú sigur United-venjarin, Sir Alex Ferguson, tó, at Rooney verður klárur til dystin. Hann er blivin seymaður í beininum, og nú er einasti spurningurin, hvør skal manna álopið hjá United. Her kann Ferguson velja ímillum Rooney, Saha og Larsson.

## Spælari dømdur fyri herverk

Flest allir fótbóltsleikarar munnu vita, hvussu tað er at blíva vrakaður. Følilsi er ikki av teimum bestu, men teir flestu royna bara at kempa enn meir fyri at vinna sær pláss á liðnum. Onkrir leikarar taka tó heilt aðrar avgerðir, tá teir blíva vrakaðir, og hetta er serbin, Slavomir Milnovic, gott dømi um. Hann bleiv so skuffaður, tá hann bleiv vrakaður til ein dyst fyri felag sítt, at hann fór heim og lándi ein traktor frá bóndagarðinum hjá familjuni. So gekk leiðin inn á vøllin hjá felagnum, har hann oyðilegði allan vøllin, so hinir spælararnir á liðnum heldur ikki skuldu sleppa at spæla dyst. Milinovic er seinni handtikin og ákærdur fyri herverk.

# Klaksvíkingar fóru avstað við FM

**Klaksvíkar Talvfelag 1 vann leygardagin føroyameistaraheitið í talvi eftir eitt sera spennandi síðsta umfar**

TALV
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Spenningurin var stórur, tá síðsta umfar í talvi var á skránni leygardagin. Kappingin um meistaraheitið stóð ímillum Klaksvík 1 og Vestmanna, og í síðsta umfarinum møttu hesi bæði liðini ávikavist Havnini og Klaksvík 2.

Dysturin millum Klaksvík 1 og Havnina var skjótt yvirstaðin, og hesin dysturin endaði við javnleiki 2-2. Tí var greitt, at um Vestmanna vann 3-1 ímóti Klaksvík 2, so kundu teir enda javnir í stigum við Klaksvík 1.

Bæði John Rødgaard og Carl Eli N. Samuelsen megnaðu at vinna á ávikavist 1. og 2. borði, meðan Samson Højgaard fekk javnt á 3. borði. Sostatt førdi Vestmanna 2½ - ½, áðrenn talvi á 4. borði ímillum Jákup á Rógvu Andreasen og Rana Baldursson var liðugt.

Hesir sótu leingi og telvaðu, men at enda megnaði Rani Baldursson hjá Klaksvík 2 at vinna talvið, og sostatt tryggjaði hann besta liðnum úr Klaksvík meistaraheitið. Teir endaðu ½ stig frammanfyri Vestmanna.



*KLAKSVÍKAR TALVFELAG 1 vann føroyameistaraheitið í talvi. Standandi frá vinstru eru teir: Finnbjørn Vang, Steintór Rasmussen, Heini Olsen, Terji Petersen, Ólavur Simonsen, Haldur Suni Johansen og Rani Nolsøe*



*VESTMANNA TALVFELAG vann kappingina í 2. deild. Standandi frá vinstru eru teir: John Jacobsen, Petur Højgaard, Samson Højgaard, Sjúrður Thorsteinsson, Jón Mikkelsen, Jákup Á Rógvu Andreasen.*



*KLAKSVÍKAR TALVFELAG vann kappingina í 3. deild. Standandi frá vinstru eru tey: Esbern Christiansen, Herborg Hansen, Mannbjørn Anthoniussen, Tummas Martin Sólsker, Dánjal Petur Jacobsen og Bogi Hansen.*



*KLAKSVÍKAR TALVFELAG vann eisini kappingina hjá unglingum. Standandi frá vinstru eru tey: Herborg Hansen, Heðin Gregersen, Einar Gregersen, Dánjal Petur Jacobsen og Bogi Hansen.*



*Tveir eldri telvarar sessast við talvborðið. Luitjen Apol úr Havnini og Jákup Mikkelsen úr Klaksvík.*

*Stórur spenningur var um, hvørt Klaksvík 1 ella Vestmanna skuldu vinna føroyameistaraheitið, men í síðsta og avgerandi talvinum megnaði Rani Baldursson hjá Klaksvík 2 at vinna á Jákup á Rógvu Andreasen hjá Vestmanna. Sostatt syrgdi Rani fyri, at meistaraheitið endaði í Klakvík.*

